– trygt og ómakaleyst til hús



# Stór ogn við 2 húsum og mongum møguleikum

**Stóra og sjáldsama ognin liggur nær miðbýnum, kann nýtast til ymisk endamál og hevur frálíkt útsýni yvir Havnina.**









## Ognin

Tú kanst koyra til ognina eftir Villingadalsvegnum ella frá Oyggjarvegnum, og lætt er at koma til. Ognin og stóra økið kann nýtast til vinnuligt virksemi eins og til at byggja bústaðir á. Grundøkið er 4.830 $m^2$. Ognin er í 3 pørtum:

Matr. nr. 1341i er 1.372 $m^2$

Matr. nr. 1342 við ástandandi húsi á 128 $m^2$ er 568 $m^2$

Matr. nr. 1343 við ástandandi húsi á 264 $m^2$ er 2.891 $m^2$

– í alt 4.830 $m^2$, sum liggja í A3 og B4 øki, so talan er um nógvar fermetrar og 2 hús. Húsini standa væl fyri á ognini og kunnu væl nýtast til mong endamál. Tey eru væl bygd, eru væl hildin og eru í góðum standi.

## Størra húsið

Størra húsið er í 3 hæddum og er bygt í 1974. Miðhæddin er 110 $m^2$, niðasta hædd er 114 $m^2$ og ovasta hædd er 40 $m^2$ – í alt 264 $m^2$. Í miðhæddini er inngongd, durur, hjallur, gongd, kamar, køkur / alrúm / borðstova, stór stova og trappuhall. Í niðastu hædd er inngongd, hall, bryggers, hjúnarúm við baðirúmi, 3 kømur og baðirúm. Í ovastu hædd er trappugongd, køkur / stova og kamar.

## Minna húsið

Minna húsið er í 2 hæddum og er bygt í 1965, hvør hæddin 64 $m^2$. Í ovaru hæddini er inngongd, wc og 2 stór rúm. Í niðaru hædd er inngongd, stórt rúm, fýrrúm og trappugongd.

## Uttanfyri og uttanum

Stórur garður / urtagarður við høsnarhúsi og hoyggjhúsi er uttanum. Húsini standa í friðarligum, veðurgóðum og barnavinarligum umhvørvi nærhendis Gundadali. Útsýnið er sera gott yvir býin og fjørðin.

## Fakta

**Adressa** ...........undir Krákugjógv 3 og 5, Tórshavn
**Byggiár:** ...........1974
**Hæddir:**............3+2
**Gólvvídd:**..........264 $m^2$ + 128 $m^2$
**Grundøki:**.........4.830 $m^2$
**Hjallur:** .............Ja
**Prísuppskot:** ...hóskandi boð

Ognirnar kunnu verða seldar hvør sær ella í einum.









PF inni
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**